## Ófriður í Norðurírlandi

Norðurírsku protestantarnir hátíðarhildu í gjár ein sigur á katolikkunum, og tað endaði við ógvusligum ófriði. Tað var tann árliga skrúðgongan til minnis um tann protestantiska sigurin á katolikkunum í 1690, sum endaði við ófriði í fleiri býum. Í býnum Armagh brast ein bumba stutt frá skrúðgonguni, og í Ardoyne varð skotið eftir løgregluni, sum svaraði aftur við vatnkanónum. Tað hevur verið toliliga friðarligt í Norðurírlandi, síðani protestantar og katolikkar samdust um eina friðaravtalu. Men í mars vórðu tríggir menn myrdir, og hildið verður fyri vist, at tað var IRA, sum gav boð um drápini.



## Hópdráp skal kannast

Amerikanski forsetin, Barack Obama, ætlar sær nú at kanna, um undanmaður hansara, George W. Bush, kávaði út yvir eitt hópdráp í Afghanistan fyri átta árum síðani. Tað er komið fram, at menn hjá afghanska krígsharranum Rashid Dustum myrdu meiri enn 1.000 Taliban-fangar á heysti í 2001. Sambært New York Times slapp krígsharrin undan rættarsókn, tí hann hjálpti amerikanska herinum í Afghanistan. Í samrøðu við CNN sigur Obama, at hann hevur biðið embætismenn sínar kanna málið, so sannleikin kann koma fram. Obama sigur, at hevur USA styðjað slíka framferð, skal amerikanski almenningurin hava tað at vita.




*- Tað var ein púra avkláraður Hans Pauli Strøm, sum í gjárkvøldið boðaði frá, at hann leggur frá sær sum landsstýrismaður. Men hann er sannførdur um, at hetta fer at koma Tjóðveldinum aftur um brekku*

# Høgni og Tobbi hava skotið seg sjálvar í fótin

**- Heksajaktin ímóti mær hevur styrkt samgonguna og soleiðis, sum Tjóðveldið hevur borið seg at, verður seinur dagur at nakar aftur fer í samgongu við tann flokkin, sigur Hans Pauli Strøm, fráfarin landsstýrismaður**

UPPSØGN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Framferðin hjá Tjóðveldinum hjá Tjóðveldinum ímóti mær, er ein heksajakt. Men var endmálið at seta kílar í samgonguna, er tað fullkomiliga miseydnað.

Hans Pauli Strøm, fráfarin landsstýrismaður í heilsumálum, er sannførdur um, at tey í Tjóðveldinum hava skotið seg sjálvi í fótin.

- Tey hava ført eina heksajakt ímóti mær fyri at fáa meg frá. Tað hevur nú eydnast, men eg eri vísur í, at hetta fer at koma Tjóðveldinum aftur um brekkur í longdini.

Hans Pauli Strøm ivast ikki í, at endamálið hjá Tjóðveldinum var at seta kílar í samgonguna.

Men hann er sannførdur um, at úrslitið verður akkurát tað øvugta.

- Tvørtur ímóti hevur hetta styrkt samgonguna og gjørt okkum enn meiri uppsett upp á at halda saman og at halda fram við samstarvinum.

### Tjóðveldið ikki aftur í samgongu

Hann sigur eisini, at síðani hann legði frá frá sær, hevur hann fingið heilt nógvar viðmerkingar frá fólki, sum vísa sín samhuga og tað hevur tikið hann á bóli.

- Nógv fólk harmast um tað, sum er hent og í ivist eg ikki í, at hetta fer at koma Tjóðveldinum aftur um brekkur ímillum manna, sigur Hans Pauli Strøm.

- Endamálið hjá Tjóðveldinum við at leggjast eftir mær og at krevja meg frá, var helst at skora nakrar bíligar atkvøður.

- Men har vænti eg, at tey hava forroknað seg, tí eftir teimum viðmerkingum at døma, sum eg havi fingið, hava fólk vent sær frá slíkari politiskari forfylging.

Men, tað, sum er uppaftur meiri alvorligari er, at fráfarni landsstýrismaðurin er púra vísur í, at við hesi framferðini, hevur Tjóðveldið forkomið sær møguleikan at koma upp í eina samgongu aftur.

- Vildi Tjóðveldið komið meirnýtsluni til lívs, høvu tey reist tað sum eitt prinsipp mál, tí tað eru so nógv landsstýrisfólk, sum hava brúkt meiri, enn tey hava fingið játtað. Men ístaðin fyri at gera tað, leggja tey seg í selarnar í eina miðvísa heksajakt fyri at fáa skovlina undir meg og tað eydnaðist.

Men Hans Pauli Strøm leggur afturat, at eftir slíkan atburð, dugir hann ikki a síggja, hvussu Javnaðarflokkurin skal kunna fara í eini samgongu við Tjóðveldið aftur við bræði, skuldi tað borið so á, at tað kundi blivið aktuelt.

- Og tað, eg havi hoyrt frá topp-politikarum í øðrum flokkum, er teirra støða akkurát tann sama.

- Sostatt hevur Tjóðveldið forkomið sær møguleikan at fáa politiskt vald aftur í Føroyum, tí illviljin ímóti at samstarva við tann flokkin, hevur neyvan nakrantíð verið størri, enn hann er nú.

Og hann leggur afturat: Tað er eitt hundalív at hava við Tjóðveldið at gera og eg dugi ikki at síggja nakran politiskan flokk, sum fer at útseta seg sjálvan fyri tað.

# Ein lætti at er tikin

**Hans Pauli Strøm, fráfarin landsstýrismaður, sigur, at hann vil hvørki bjóða sær sjálvum, Javnaðarflokkinum, samgonguni ella heilsuverkinum at halda fram sum landsstýrismaður**

UPPSØGN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað er ein lætti, nú avgerðin um at eg skal fara frá, er tikin.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, sigur, at seinastu dagarnar hevur hann brúkt nóv tíð upp á at hugsa um, hvat hann skal gera í kjalarvørrinum á tí, sum hann kallar eina miðvísa heksajakt frá Tjóðveldinum.

Tjóðveldið hevur klagað Hans Paula Strøm fyri at hava brúkt pening til heilsuverkið, áðrenn Løgtingið hevur samtykt at játtað hann.

Tað endaði við, at Hans Pauli Strøm í gjárkvøldið boðaði frá, at hann leggur frá sær sum landsstýrismaður.

Hann viðgingur eisini, at avgerðin um at leggja frá sær, hevur verið tung at taka.

Men tá ið avgerðin var tikin, var tað ein lætti, leggur hann afturat.

Hann sigur, at sum støðan er vorðin ivast hann ikki í, at Tjóðveldið hevði ikki givið seg, men hevði blivið við at bora í málinum.

- Tí hevði tað ikki blivið arbeiðsfriður hjá mær og tað hevði eg ikki kunnað bjóðað mær sjálvum, mínum húski, mínum flokki og mínari samgongu.

- Men ikki minst hevði eg ikki kunnað bjóða øllum starvsfólkunum í Heilsuverkinum, at teirra arbeiðspláss skal verða plágað av politiskum ófriði.

Tí vil hann ikki bjóða nøkrum at verða hunddálkaður í eini framhaldandi politiskari atsókn frá Tjóðveldinum.

Hann staðfestir, at eftir nógv rumbul og nógvan ófrið í fleiri ár, hevur tað eydnast at skapa støðufesti og frið í heilsuverkinum og tí vil hann ikki lata sín persón verða orsøkin til, at friðurin verður brotin.

### Hevur góða samvitsku

Hans Pauli Strøm, staðfestir, at tað er við góðari samvitsku, at hann leggur frá sær, tí hann hevur gjørt sítt besta í starvinum, sum í størstan mun hevur verið til frama fyri samfelagsins veikastu.

Og hann heldur eisini, at hann hevur tikið framrættað, heilsupolitisk stig til gagns fyri allar borgarar í landinum.

- Spurningurin var um tað rættasta var at tvíhalda um ein sess, sum tað framhaldandi verður ófriður um, ella um eg fari frá, so onkur annar kann yvirtaka sessin, leggur hann afturat.

Hans Pauli Strøm staðfestir, at tað er ómetaliga tørført at stýra peninganýtsluni og tí mælir hann til, at greiðar mannagongdir og skipanir verða gjørdar, so at landsstýrisfólk sleppa undan at koma í hesa støðuna.

- Verður onki gjørt og skal hendan avgerðin hjá landsstýrismálanevndini ímóti mær leggja støðið, verður tað ikki eitt tað einasta landsstýrisfólk, sum klárar at varðveita starvið. Tað kunnu vit ikki liva við og tí verður neyðugt at finna varandi loysnir.

Nøkur stig eru tikin við at hava neyvari eftirlit við nýtsluni hvønn mánað, men tað er ikki nóg mikið, sigur hann.

- Fíggjarlógin er eisini ein ætlan, sum Løgtingið samtykkir og tað er hetta, sum landsstýrið skal miðja eftir, men tað er ómøguligt at tryggja, at tað ikki verður farið út um karmin.

Og at fáa eina eykajáttan tekur so drúgva tíð, at nógvir pengar kunnu vera brúktir, áðrenn tað eydnast at fáa hana avgreidda- ella, sum tað hendir viðhvørt, at eykajáttanin verður vrakað og so stendur landsstýrismaðurin eftir við trupulleikanum.

- Tí verður neyðugt at finna smidligari mannagongdir og tað verður ein politisk avbjóðing, sum eg fari at gera mítt til at loysa, sigur Hans Pauli Strøm.